## Hoyvíkar kirkja 2005–2007

**Byggiharri:**
Tórshavnar Eystara Kirkjuráð

**Bygginevnd:**
Katrin Dahl, formaður, Jákup Símun Simonsen, Bjarni Bæk, Bente Kjær, Petur Even Djurhuus, Heðin Mikkelsen og Gunnar Hoydal

**Tekning:**
Arkitektarnir Albert Isfeldt, Gudmund S. Hansen og Rúni H. Øster vunnu í 1983 kappingina um at tekna kirkjuna

**Ráðgevarar:**
Albert Isfeldt & Gudmund S. Hansen, arkitektar, AF; Preben Hansen, ráðgevandi verkfrøðingar, konstruktiónir; Martin E. Leo, ráðgevandi verkfrøðingar, HVS-prosjekt; Viggo A. Hansen, verkfrøðingur, el-prosjekt og Johannes Steingrund, ljóðtekniskur ráðgevi

**Høvuðsarbeiðstakari:**
Articon

**Undirveitarar:**
HVS: Maria Poulsen
El-arbeiðið: Leif Mohr.
Málari: Magni Jacobsen
Kopartekja: Gunner Kristensen, Herning
Ljóðanlegg: Fokus Elektronik
Linoleumsgólv: Litaval

**Byggileiðari:**
Vagn Nielsen

**Grundarsteinurin**
varð lagdur 20. juni 2005 av Margrethu drotning og Heindrikki prinsi. Innskriftin er fingin úr 5. Mósesbók 33,27: "Bústaður er hin ævigi Guð, og her niðri eru hinir ævigu armar". Grótvirkið í Skopun gjørdi steinin

**Altartalvuna**
málaði Sven Havsteen-Mikkelsen, listamálari. Hon hevur higartil hingið uppi í Meinigheitshúsinum í Havn

**Kristskrossurin**
er ein gáva frá Eivind Vilhelm, bispi. Hann stuðlaði byggingin av heilug huga, heilt til hann andaðist. Sven Havsteen-Mikkelsen gjørdi eisini krossin

**Altarvindeyguni**
ger listakvinnan Hansina Iversen úr málaðum og brendum glasi

**Kirkjurúmið**
innan er klætt við spónløgdum Oregon Pine viði. Gólvið er úr askaviði

**Doypifuntin**
teknaðu arkitektarnir, eins og alt annað fast innbúgv. Grótvirkið í Skopun gjørdi hann úr føroyskum gróti

**Ljósakrúnurnar**
gjørdi Theis Illumination í Odense. Tær eru lagdar við 24 karat gulli

**Lampurnar**
úr messingi gjørdi felagið Okholm Lightning í Tønder

**Kirkjustólarnir**
HB Møblar í Skive og felagið Woodvize í Roslev gjørdu stólarnar eftir tekningum hjá arkitektunum. Poul Poulsens Polstermøbelfabrik í Skive legði á stólarnar. Bólstringin á stólunum er úr føroyskari ull, sum Snældan á Strondum spann, og Tóra og Egil Simonsen á vevstovuni Mýrifípuni hava vovið

**Annað innbúgv**
hevur Farodane útvegað

**Kirkjusilvurið**
er ein gáva, sum Søren Weitemeyer, gullsmiður í Århus gjørdi

**Messuakulin**
gjørdu Jenny Simonsen, Eydna Fosaa, Malena Fosaa, Ingilín holm og Ingibjørg Kristiansen

**Urguna**
hava A.E.Lang's eftft. Orgelbyggeri gjørt og sett upp í kirkjuni. Urgan hevur 8 røddir og er gjørd soleiðis, at hon seinni kann byggjast út

**Kirkjuklokkan**
er gjørd úr málmi hjá Olsen Nauen Klokkestøperi í Tønsberg. Hon ringir við tónanum F1. Gunnar Hoydal skrivaði ørindið, sum er stoypt í kirkjuna: "Um bygdan haga, vík og dal, í ljósins verki eg ljóða skal".

**Annað:**
Kostnaðurin fyri kirkjuna er 46 mió kr.
Pláss er fyri 638 fólkum



*Bygginevndin fegnast um úrslitið – ta nýggju Hoyvíkar kirkju: Vinstrumegin: Bjarni Bæk, Vagn Nielsen, Gunnar hoydal, Bente Kjær, Katrin Dahl, Jákup Símun Simonsen, Heðin Mikkelsen og Peter Even Djurhuus*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Rørandi løta tá kirkjuklokkan ringdi

**Albert Isfeldt, sum var ein av teimum, ið teknaði Hoyvíkar kirkju, ásannaði, at tá ið kirkjuklokkan kom upp at hanga, og tey fyrstu ljóðini hoyrdust úr henni, rann veruliga upp fyri honum, at hetta var ein kirkja. – Hetta var ein rørandi løta, tí líkasum tástaðni fataði tú, at hetta var ein kirkja, segði hann**

~~HOYVÍKAR KIRKJA~~
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í sambandi við, at Hoyvíkar kirkja nú er liðug, og almenn vígsla og gudstænasta verður allahalgannasunnudag, 4. november, varð skipað fyri tíðindafundi í kirkjuni í morgun.

Á fundinum handaði Jón Danielsen, stjóri í byggifyritøkuni Articon formanninum í kirkjuráðnum og limi í bygginevndini, Jakup Símon Simonsen, formelt eisini lykilin til kirkjuna.

### Stór gleði

Tað var eisini Jákup Símun Simonsen, sum legði fyri á tíðindafundinum.

Hann segði, at tað er við stórari gleði, at bygginevnd og kirkjuráð nú eftir 25 árum kunnu bjóða fólki at síggja lidnu og snotuligu kirkjuna.

Hann greiddi í stuttum frá gongdini, síðan bygginevndin hevði sín fyrsta fund 17. november í 1982 – og síðan Margretha drotning legði grundarsteinin 20. juni í 2005.

Á tíðindafundinum skiltist, at stígur kom í ætlaninar at byggja Hoyvíkar kirkju, tá føroyska samfelagið seinast í áttatiárunum rendi seg í samfelagskreppuna, sum av álvara setti síni spor í byrjanini av nítiárunum.

Í 1999 varð av álvara farið til verka aftur.

- Í dag stendur Hoyvíkar kirkja sum ein varði millum gomlu Hoyvíkina og nýggja partin av Hoyvíkini. Kirkjan hevur røttu tignina, og vit kunnu vera samd um, at hetta er arkitekturur á hægsta stigi.

Jákup Símun Simonsen segði, at eitt slíkt bygningsverk ikki kann reisast á føtur uttan við góðum samstarvi millum allar partar.

- Eg vil takka øllum, sum hava verið við til at gjørt hesa verkætlan møguliga, og eg vil ikki minst takka Articon, ið sum bygggiharri hevur latið okkum hetta prýðiliga verk.

Hann segði, at uttan allan tann stuðul, sum er veittur, bæði peningaliga og moralskt, hevði kirkjan ikki staðið so prýðilig, sum hon stendur liðug í dag.

- At enda vil eg takka hinum Altvaldandi fyri, at hetta verk eydnaðist, segði Jákup Simon Simonsen.

### Nógv tíð

Á tíðindafundinum segði Alberg Isfeldt, arkitetur, nøkur orð fyri teir, sum í sínari tíð vunnu kappingina um at tekna kirkjuna.

- Hetta er ein stórur dagur fyri okkum, og hetta er samstundis endin – ella byrjanin – á eini langari søgu.

Hann segði, at arbeiði at tekna, tillaga og broyta kirkjuna hevur verið ógvuliga áhugavert.